# TÍÐINDI

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Ávirkaðir yvirmenn áttu at mist pappírini



*Michael Krog Christensena: -Yvirmenn, sum føra skip ávirkaðir av rúsdrekka, eiga at missa pappírini.*

**Reiðarin á danska promilluskipinum „SC Baltic“ heldur, at skiparar og stýrimenn, sum føra skip ávirkaðir av rúsdrekka, áttu at mist pappírini**

SIGLING
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

- Tað líkist ongum, at yvirmenn, sum sigla ávirkaðir av rúsdrekka, sleppa at varðveita síni pappír, sigur danski reiðarin Michael Krog Christensen.

Hann veit, hvat hann tosar um. Tvær ferðir er farmaskipið „SC Baltic“, sum hann er reiðari á, farið á land í Noregi. Í tí fyrra førinum er tann vakthavandi yvirstýrimaðurin dømdur fyri at havaført skip ávirkaður av rúsdrekka, og í tí seinna førinum bíðar norska løgreglan eftir, hvat blóðroyndin av skiparanum sigur. Ein roynd við einum alkometuni vísti, at hann hevði drukkið. Felags fyri báðar tilburðirnar er, at tann dømdi yvirstýrimaðurin og tann skuldsetti skiparin eru føroyingar.

Fyribils hevur norska ákæruvaldið skuldsett tann 37 ára gamla skiparan fyri at hava ført skip ávirkaður av rúsdrekka, og sambært reiðaranum eru avleiðingarnar longu greiðar.

- Í mínari verð er tað líka mikið, um primillan var 0,2 ella 3,5. Hann fær undir øllum umstøðum sekkin, sigur Michael Krog Christensen við Haugesunds Avis. Hann er sera harmur um teir báðar tilburðirnar, tí tað er bannað at drekka rúsdrekka umborð á skipunum hjá reiðarínum.

## Skuldu mist pappírini

Í síðstu viku varð tann 55 ára gamli føroyski yvirstýrimaðurin dømdur 25 dagar í fongsul fyri at hava ført skip ávirkaður av rúsdrekka. Promillan var sambært dóminum minst 1,56. Men hann hevur framvegis síni pappír.

- Eftir mínari hugsan átti revsingin at verið munandi harðari, og í slíkum førum skuldu menn mist pappírini, sigur Michael Krog Christensen.

Hann er ikki einsamallur um ta áskoðanina. Sigurd Gade,virkandi sjóferðslustjóri, sigur við Haugesunds Avis, at myndugleikarnir kunnu taka siglingarloyvið frá skipinum, men ikki rættindini frá honum, sum førir skipið. Spurdur, um yvirmenn, sum føta skip ávirkaðir av rúsdrekka, áttu at mist pappírini, er sjóferðslustjórin ikki í iva:

- Skal eg siga mína persónligu hugsan, so er svarið ja.

